# Býráðið

**Dagfesting:** 31.10.2024 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir: Sheila S. Sóldal fyri David Andreasen

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| | | |
|---|---|---|
| **Málsyvirlit** | | |
| **Til støðutakan** | | |
| 35/24 | 22/00309-4 | Mannagongdir í samband við útlutan av grundstykkjum í Fuglafjarðar kommunu |
| 36/24 | 24/00456-1 | Broyting av byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 117b |
| 37/24 | 24/00457-1 | Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 565 frá I: frílendi til B: Sethús og bústaðarøki |
| 38/24 | 24/00500-1 | Broytingar og rættingar í byggisamtyktini hjá Fuglafjarðar kommunu |
| 39/24 | 24/00469-1 | Eykajáttan heyst 2024 |
| 40/24 | 24/00250-5 | Uppskot til ársfíggjarætlan 2025 |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

## 35/24
## 22/00309-4 Mannagongdir í samband við útlutan av grundstykkjum í Fuglafjarðar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.10.2024 | 44/24 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 35/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd og býráð | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Á býráðsfundi hin 26. september 2024 samtyktið býráðið einmælt at grundstykkja bíðilistin ikki skal strikast, men at gera fastar mannagongdir fyri tillutan av grundstykkjum. Umsitingin hevur funni mannagongdir fram hjá øðrum kommunum, og hevur gjørt eitt uppskot til mannagongd fyri Fuglafjarðar kommunu. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Býráðið í Fuglafjarðar kommunu hevur heitt á umsitingina um at gera ein leist fyri mannagongdina fyri tillutan av grundstykkjum í kommununi. | | |
| Grundarlag | • Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn<br>• Uppskot til reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús í Fuglafjarðar kommunu<br>• Mannagongdir Eystur kommuna - Grundstykkir — Eysturkommuna<br>• Mannagongdir Sunda kommuna - Grundstykki - Sunda kommuna<br>• Reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús, Tórshavnar kommuna - reglugerð-fyri-u-tlu-tan-av-grundoekjum-til-sethu-s-mars-2024.pdf (torshavn.fo)<br>• Reglugerð um umsiting av bíðilista til grundstykki í Vága kommunu | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | x | |

2

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Teknsiki leiðari mælir til at nevndin gjøgnumgongur og viðmerkir uppskotið til reglugerðina, fyri síðani at koma við einum leisti til góðkenningar í býráðnum.<br><br>Uppskot á fundinum frá formanninum í teknisku nevnd er at broyta §6 til at "Tekniska saman við fíggjarnevndini kann í heilt serligum førum loyva fráviki frá reglugerðini". |
| Dagf | 09.10.2024 |

**Tekniska nevnd 17. oktober 2024:**
Tekniska nevnd hevur gjøgnumgingið reglugerðina og mælir býráðnum til at samtykkja reglugerðina sum er í uppskot 1. Og at reglugerðin verður tikin uppaftur til viðgerð og eftirmeting eftir 2. árum eftir at hon er samtykt í býráðnum.

**Býráðið 31. oktober 2024:**
Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá formanninum í teknisku nevnd. Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum. Síðani varð atkvøtt um samlaða uppskotið við broytingunum í §6. Býráðið tók einmælt undir við reglugerðini við samtyktu broytingini.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 36/24
## 24/00456-1 Broyting av byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 117b

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.10.2024 | 39/24 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 36/24 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd og býráð | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Tekniska nevnd hevur diskutera møguleikarnar fyri at byggja inni í bygdini, har kommunan longu eigur byggilendi. Tala hevur verið um matr.nr. 117b. Møguleiki kundi verið at gjørt búeindir við innkoyring frá Mørkini, eins og búeindir høvdu innkoyring frá Mirmansvegi. Tí er uppskot frá nevndini um at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 117b frá vegi til B: Sethús og bústaðarøki við serligum ásetingum fyri hvussu nógvar eindir kunnu byggjast á matrikkulin. Hetta kann opna upp fyri at møguligir íleggjarar keypa lendi at byggja fleiri búeindir á sum kann økja um íbúgvatalið í kommununi. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Avmarkað pláss til bústaðir inni í bygdini millum verandi sethús. Og at opna møguleikan hjá møguligum íverksetum at gera eina byggiætlan sum kann húsa nógvum familjum og støkum. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Teksiki leiðari mælir til at tekniska nevnd broytir byggisamtyktina til bústaðarøki við serligum ásetingum fyri hvussu nógvar búeindir kunnu byggjast á matrikkulin. At gera byggisamtyktartekstin fyri ásetingarnar, fyri síðani at beina málið víðari til býráðið til endaliga viðgerð.<br><br>Sheila S. Sóldal hevur broytingaruppskot um, at broyta byggisamtyktina fyri hetta økið til F, «alment frítíðarøki».<br><br>Borgarstjórin hevur broytingaruppskot um, at senda málið aftur í teknisku nevnd, fyri at fáa tað betur gjøgnumarbeitt. | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 03.10.2024 |
|---|---|

**Tekniska nevnd 17. oktober 2024:**
Tekniska nevnd fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara um at broyta byggisamtyktina til B: Sethús og bústaðarøki við hesum ásetingum:

- At byggjast kann upp til 6 búeindir á matrikkulin
- At atkoma til grundstykki kann vera frá Mirmansvegi og Mørkini.
- At mønan ikki er hægri enn 5 m frá veghæddini á Mirmansvegi.
- Mest loyvda byggistig er 0,8
- Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu vera í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Fuglafjarðar kommunu

**Býráðið 31. oktober 2024:**
Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið frá borgarstjóranum. Býráðið tók enmælt undir við hesum og verður málið tí sent aftur í teknisku nevnd.

## 37/24
## 24/00457-1 Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 565 frá I: frílendi til B: Sethús og bústaðarøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.10.2024 | 40/24 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 37/24 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd og býráð | | |
| Stutt lýsing av málinum | Tekniska nevnd hevur diskutera møguleikarnar fyri at byggja inni í bygdini, har kommunan longu eigur byggilendi. Tala hevur verið um matr.nr. 565. Tí er uppskot frá nevndini um at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 565 frá I: Frílendi til B: Sethús og bústaðarøki við serligum ásetingum fyri hvussu nógvar eindir kunnu byggjast á matrikkulin. Hetta kann opna upp fyri at møguleigir íleggjarar keypa lendi at byggja fleiri búeindir á sum kann økja um íbúgvatalið í kommununi. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Avmarkað pláss til bústaðir inni í bygdini millum verandi sethús. Og at opna møguleikan hjá møguligum íverksetum at gera eina byggiætla sum kan húsa nógvum familjum og støkum. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Teknsiki leiðari mælir til at tekniska nevnd broytir byggisamtyktina til bústaðarøki við serligum ásetingum fyri hvussu nógvar búeindir kunnu byggjast á matrikkulin. At gera byggisamtyktartekstin fyri ásetingarnar, fyri síðani at beina málið víðari til býráðið til endaliga viðgerð. | | |
| Dagf | 03.10.2024 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Tekniska nevnd 17. oktober 2024:**

Tekniska nevnd fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara um at broyta byggisamtyktina til B: Sethús og bústaðarøki við hesum ásetingum:

- At byggjast kann upp til 4 búeindir á matrikkulin
- At atkoma til grundstykki kann vera frá Mirmansvegi og Vesturrás
- At mønan ikki er hægri enn 5 m frá veghæddini á Mirmansvegi.
- Mest loyvda byggistig er 0,8
- Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu vera í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Fuglafjarðar kommunu

**Býráðið 31. oktober 2024:**

Uppskotið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 1 ímóti. Gudny Vang atkvøddi ímóti.

7

**38/24**

**24/00500-1 Broytingar og rættingar í byggisamtyktini hjá Fuglafjarðar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.10.2024 | 41/24 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 38/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd og býráð |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Byggisamtyktarkortið hjá Fuglafjarðar kommunu, hevur fleiri ósamsvar í kortinum. Nakrar av broytingunum eru rættingar, so kortið samsvara vegir, útstykkingar og bygningar, sum longu standa. Talan er um at broyta byggisamtyktina í 7 ymiskum kortum.<br>- Broyting á korti 1: Toftabrekkan og Toftatún. Her er nakað av vegnum á kortinum sum vegur, men partur av hesum samsvarar ikki har vegurin gongur í dag. Eisini eru matriklar sum liggja sum vegur, men hesir verða broyttir til B: Sethús og bústaðarøki., so allur matrikkulin liggur í B: Sethús og bústaðarøki.<br>- Broyting á korti 2: Rossagerði í Fuglafirði. Her liggur bústaður í I: Frílendi. Hesin bústaðurin hevur verið á I: Frílendi í meiri enn 30 ár. Talan er um at broyta frá I: Frílendi til B: Sethús og bústaðarøki., sum samsvarar byggingina á staðnum. Eisini verður vegurin rættaður soleiðis at hann samsvarar har vegurin er í dag. Økið rundanum vegin verður B: Sethús og bústaðarøki.<br>- Broyting á korti 3: Stovugerði og Hornavegur. Útstykkingarætlanin samsvarar ikki tað broytingina sum hevur verið gjørd, og tí liggur vegurin inni á B: Sethús og bústaðarøki.. Her eru rættingarnar so tær samsvara vegnum sum hann er í dag.<br>- Broyting á korti 4: Síðuvegir á Innandalsvegi verða broyttir frá B: Sethús og bústaðarøki. til vegir<br>- Broyting á korti 5: Garðavegur og Bjarnavegur verður vegurin broyttur so hann samsvarar har vegurin gongur í dag. Matriklarnir rundanum vegirnar verður broytt til B: Sethús og bústaðarøki.<br>- Broyting á korti 6: Bøvegur og longur ímóti Enninum. Har er gjørd ein leið fyri ein veg. Hesin vegurin gongur burtur og verður broytt til B: Sethús og bústaðarøki.. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | - Broyting á korti 7: Húsini sum standa í Ennivegi og niðaru síðu yvir til Kirkjurygg liggja í Havna- og miðstaðarøki. Hesin verður broyttur til B: Sethús og bústaðarøki. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Byggingar og útstykkingar samsvara ikki byggisamtyktarkortinum hjá Fuglafjarðar kommunu. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir til at broyta byggisamtyktarkorti hjá Fuglafjarðar kommunu í samsvar við viðløgdu 7 kort. | | |
| Dagf | 03.10.2024 | | |



**<u>Tekniska nevnd 17. oktober 2024:</u>**
Tekniska nevnd fylgir einmælt tilmæli frá tekniska leiðara.

**<u>Býráðið 31. oktober 2024:</u>**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum og teknisku nevnd.

**39/24**

**24/00469-1 Eykajáttan heyst 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.09.2024 | 52/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 32/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.10.2024 | 60/24 |
| 4 Býráðið | 31.10.2024 | 39/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd og býráð |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fíggjarárið 2024 er nú liðið so mikið at tað er sjónligt at játtanin á ávísum økjum ikki fer at halda. Umsitingin hevur gjøgnumgingið játtan og nýtslu og er komin framm til, at áleið DKM 3,4 resta í fyri at fáa játtanina at halda. Høvuðsorsøkin til hetta er at økið 3 ikki megnar at halda sína játtan. Mælt verður til at økið 3 fær áleið DKM 2,1 eyka. Hetta skyldast í mestan mun lønarlyft,, eins og nýggji sáttmálin við pedagogfelagið er lutfallsliga nógv hækkaður. Somuleiðis hava sjúkrameldingar viðført hægri rakstrarkostnað enn væntað.<br>Hini økini, ið biða um eykajáttan eru:<br>Økið 1: 100.000 vegna hækkandi kostnað<br>Økið 6: Ov lítið er avsett til lønarpartin á ávikavist kirkjugarðar og vatnveiting. Somuleiðis eru kloakkir í verri standi, eins og bilar og maskinum krevja nógvar ábøtir.<br>Á økið 7 er sáttmálin um nýggja sløkkiliðsbilin undirskrivaður. Veitarin ynskir at gjaldið fyri bilini verður skrúva øðrvísi saman og er tískil neyðugt við nýggjari játtan á DKK 286.000.<br>Bilurin gerst ikki dýrari enn áður fráboða.<br>Umsitingin metir ikki tað vera gjørligt at spara DKM 3,4 seinastu mánaðarnar í árinum og mælir tískil til, at politisk støða verður tikin til, hvørt meirnýtslan skal fíggjast av íløgujáttan fyri árið 2024, ella um fíggjast skal við innistandandi. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Eykajáttan | Heyst 2024 | |
| RS | Flytingar frá | Upphædd | Viðmerking |
| RS | Flyting til | Upphædd | Viðmerking |
| 130 | Kommunuskrivstovan | 100.000 | Keyp av vørum og tænastum |
| 310 | Barnalund | 450.000 | Lønarlyft og sáttmálareguleringar |
| 314 | Stropin | 535.000 | Lønarlyft og sáttmálareguleringar |
| 318 | Kambur | 1.100.000 | Lønarlyft og sáttmálareguleringar, sjúkramelding |
| 636 | Kirkjugarðar | 75.000 | lønir |
| 650 | Vatnveiting | 400.000 | lønir |
| 660 | Kloakkir | 200.000 | Keyp av vørum og tænastum |
| 672 | Kavarudding | 100.000 | ov lítið sett av |
| 680 | Gøtuljós | | Kontan tóm |
| 681 | Gøtuljós íløgur | 90.000 | Meirnýtsla |
| 690 | Bilar og maskinum | | ov lítið sett av |
| 691 | Bilar og maskinur (íløga | 60.000 | ov lítið sett av |
| 771 | Sløkkiliðið (íløgur) | 286.000 | Býtið av ætlað kostnaðinum verður øðrvísi, meðan samlaði kostnaðurin ikki verður hægri |
| | | 3.396.000 | |

**Tillagingar í eykajáttanini til 2. Viðgerð**
Gjøgnumgongd av fíggjarstøðuni ímillum 1. og 2. Viðgerð vísir at neyðugt er at økja eykajáttanina við netto 185 tkr.

Talan er um meirútreiðslu til hesi øki:

- Øki 1 meirjáttan uppá 50 tkr. til keypa av vørum og tænastum
- Øki 2 meirjáttan uppá 50 tkr. til heilsumiðstøðina
- Øki 5 meirjáttan uppá 40 tkr. til fótbóltsvøllin og 75 tkr. til mentanardagar
- Øki 6 meirjáttan uppá 25 tkr. til gøtuljós og 25 tkr. til Bilar og maskinur.
- Økið 6 meirjáttan uppá 200 tkr. Til liðuggerð av toftanesvegi

Talan er um minninýtslu á hesum økjum:

- Øki 5 minni nýtsla Piddasahandil á 75 tkr.
- Øki 6 minni nýtsla Bilar og maskinur 5 tkr.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | Eykajáttan | Heyst 2024 | |
| BSL | RS | Flytingar frá | Upphædd | Viðmerking |
| | 564 | Piddasahandil | -75.000 | Flyting millum sama økið! |
| | RS | Flyting til | Upphædd | Viðmerking |
| Hækkað 50000 | 130 | Kommunuskrivstovan | 150.000 | Meirnýtsla á kt 14 |
| Nýtt | 220 | Kommunulæknin | 50.000 | Meirnýtsla |
| | 310 | Barnalund | 450.000 | Lønarlyft og sáttmálareguleringar |
| | 314 | Stropin | 535.000 | Lønarlyft og sáttmálareguleringar |
| | 318 | Kambur | 1.100.000 | Lønarlyft og sáttmálareguleringar, sjúkramelding |
| Nýtt | 536 | Mentanardagar | 75.000 | Meirnýtsla |
| Nýtt | 570 | ótbóltsvøllurin, ítróttaranleg | 40.000 | Játtan uppi |
| | 671 | Nýgerð vegir | 200.000 | Toftanesvegur líðugur |
| | 636 | Kirkjugarðar | 75.000 | lønir |
| | 650 | Vatnveiting | 400.000 | lønir, meirnýtsla á 900000 |
| | 660 | Kloakkir | 200.000 | Meirnýtsla á 700000 |
| | 672 | Kavarudding | 100.000 | ov lítið sett av |
| Upphædd manglað | 680 | Gøtuljós | 25.000 | Kontan tóm |
| | 681 | Gøtuljós íløgur | 90.000 | Meirnýtsla |
| Upphædd manglað | 690 | Bilar og maskinum | 25.000 | ov lítið sett av |
| | 691 | Bilar og maskinur (íløga) | 55.000 | ov lítið sett av |
| | 771 | Sløkkiliðið (íløgur) | 286.000 | Býtið av ætlaða kostnaðinum verður øðrvísi, meðan samlaði kostnaðurin ikki verður hægri |
| | | | 3.781.000 | |

| | |
|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunustýrislógini §38 skal fíggjarnevndin ummæla uppskot til eykajáttan, sum skal leggjast fyri býráðið og sambært § 41 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | krevur eykajáttanin tvær góðkenningar frá kommunustýrinum við í minsta lagi 14 daga millumbilum. | | |
| Grundarlag | • Grundarlag: Kommunustýrislógin og Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu<br>• Viðfest: Heyst Yvirlit yvir flytingar til eykajáttan.xls, Eykajáttan 2024 – frágreiðingar og Heyst Yvirlit yvir flytingar til eykajáttan(versión 1) til aðru viðgerð.xls | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndin gjøgnumgongur umbønina um eykajáttan og tekur støðu til tølini og hvussu hetta verður fíggjað.<br><br>**Tilmæli til aðru viðgerð:**<br>Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur undir við broytingunum til aðru viðgerð og mælir býráðnum til at samtykkja eykajáttanina uppá netto 3.781 tkr. við aðru viðgerð. | | |
| Dagf | | | |



**Fíggjarnevndin 23. september 2024:**
Fíggjarnevndin tekur undir við eykajáttan uppá 3,6 mió. kr. íroknað liðugtgerð av vegi/gongubreyt á Toftanesvegnum og at hetta verður fíggjað av innistandandi(meirinntøka kommunuskatt).

**Býráðið 26. september 2024:**
Býráaðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um eykajáttan uppá 3,6 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2024:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum um eina eykajáttan uppá netto 3.781 tkr. og mælir býráðnum, at samtykkja hesa við aðru viðgerð.

**Býráðið 31. oktober 2024:**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini við aðru viðgerð.

**40/24**
**24/00250-5 Uppskot til ársfíggjarætlan 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.09.2024 | 51/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 33/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.10.2024 | 61/24 |
| 4 Býráðið | 31.10.2024 | 40/24 |
| 5 Býráðið | | |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd og býraðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar býráð skal í seinasta lagi 1. desember 2024 hava samtykt fíggjarætlanina fyri 2025.<br><br>Fyrisitingin hevur fingið inntøkumetingar frá TAKS fyri kommunuskatt, skatt av kapitaleftirlønum og skatt av DIS/FAS. Eftir er at meta um partafelagsskattin komandi árið.<br><br>Á útreiðslusíðuni hevur umsitingin gjørt sær metingar av lønar- og prísvøkstri, so framskrivingar af útreiðslusíðuni kunnu gerast.<br><br>Fíggjarnevndin og harnæst býráðið skulu taka avgerð um bæði rakstrar og íløgukarm herundir, skattaprocent, barnafrádrátt og raðfestingar á ymisku rakstrarstøðunum.<br><br>Viðfest erui skjøl, sum verða grundarlag fyri viðgerðini í fíggjarnevndini.<br><br>**Til býráðsfundin 30.10.2024**<br>Eitt samlað býráð hevur viðgjørt fíggjarætlanina 2 dagar á uttanhýsis fundi eins og fíggjarnevndin 28. oktober 2024 hevur viðgjørt fíggjarætlanina.<br><br>Tað vísir seg at verða avbjóðingar at halda seg til samtykta rakstrarkarmin uppá 86,3 mió. kr. uttan at broyta tænastustøði í kommununi. Orsøkin er, at lønarhækkingarnar við seinastu lønarsamráðingum hækka lutfalsliga væl meir enn væntaðu inntøkurnar. Raksturin komandi ár er í núverandi uppskoti 88,5 mió. kr. ella góðar 2 mió. kr. hægri enn samtykti karmurin. |

13

| | |
|---|---|
| | Løgurnar eru í núverandi uppskoti 36,2 mió. kr. sum er góðar 6 mió. kr. omanfyri samtykta karmin. Raðfestingarnar í komandi løguætlan eru í rundum tølum:<br><br><u>Øki 1 Fyrisiting</u>: framhald av miðbýarætlan 2 mió kr.<br><u>Øki 2 Almanna og heilsumál</u>: Ventilatión og neyðstreymur til Vesturstovu 435 tkr.<br><u>ØKi 3 Børn og ung</u>: Sifta tak á Barnalund 1.5 mió. Kr.<br><u>Øki 4 Undirvísing</u>: Umvæling av 64-skúlanum 4 mió. Kr.<br><u>Øki 5 Mentan og frítíð</u>: Málgoymsla v.m 900 tkr. og Ítróttarhøllin á Kambsdali 600 tkr.<br><u>Øki 6 Teknisk mál: íalt 14,6 mió kr.</u><br>• Spillvatnsætlan 2 mió. Kr.<br>• Vegagerð 3,3 mió. Kr.<br>• Útstykkingar 4,4 mió. Kr.<br>• Kirkjugarðar 800 tkr.<br>• Vatnveiting á Hellunum 1 mió. kr.<br>• Gøtuljós 825 tkr.<br>• Vegir og gøtur á Hellunum 200 tkr.<br>• Gongubreyt á Kambsdali 250 tkr.<br>• Vatnveiting 500 tkr.<br>• Fríøki 200 tkr.<br>• El-løðistøð/Varandi orka 100 tkr.<br><u>Øki 7 Kommunalt virki</u>: Bryggja sambært avtalu millum Fuglafjarðar kommunu og Havsbrún frá 2019, 10 mió. kr., umhvørvisøkið á Kambsdali 600 tkr. og brandbilur 1,9 mió. Kr. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært §16 1. petti í kommunustýrisskipanini hjá Fuglafjarðar kommunu skal uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár verða løgd fyri býráðið áðrenn 1. oktober. og endalig fíggjarætlan góðkennast við 2. viðgerð innan 1. Desember í inniverandi ári. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt:** Kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu<br>• **Møgulig fylgiskjøl:**<br>• Notat um yvirskipaður karmar fyri fíggjarárið 2025<br>• Viðmerkingar til FÆ2025 samlað<br>• JET - Fíggjarætlan RS 1234567 2025<br>• JET - Fíggjarætlan RS 1234567 2025 (version 1)Viðareiði<br>• JET - Fíggjarætlan RS 1234567 2025 (version 1)Viðareiði +1.v...<br>• øki 2 samla í eitt dokument<br>• øki 3 samla í eitt domument<br>• Tilfar til fíggjarætlan øki 4<br>• Tilfar til fíggjarætlan øki 5<br>• øki 6 |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíoggjarnevndin tekur støðu til karmarnar fyri fíggjarárið 2025, sum verður lagt fyri býráðið til støðutakan.<br><br>**Tilmæli til býráðsfundin 26.09.2024.**<br>Mælt verður býráðnum til taka støðu til fylgjandi karmar:<br>• Skattaprosentið verður óbroytt 21,25%<br>• Barnafrádrátturin hækkar við 500 kr. til 8.500 kr. pr. barn. Hendan hækkingin svarar samanlagt til umleið 192 tkr. í 2025.<br>• At raksturin verður framskrivaður við dagførdum lønarkarmi og lønarhækking uppá 4%, sum gevur ein netto rakstrarkarm á 86,3 mió. kr., sum er 3,3 mió. kr. hægri enn í 2024.<br>• At løgukarmurin verður 30 mió. kr. netto<br><br>Ólavur Larsen kom á fundinum við uppskoti um, at miða ímóti at lækka raksturin samanlagt við 450 tkr. og løgurnar við samanlagt 2,0 mió. kr. | | |
| Dagf | 20. september 2024 | | |



**<u>Fíggjarnevndin 23. september 2024:</u>**
Fíggjarnevndin mælir til, at skattaprosentið verður óbroyttur 21,25% og barnafrádrátturin hækkar við 500 kr. til 8.500 kr. pr. barn. Mælt verður til at lønirnar verða dagførdar við lønarliftinum og síðani framskrivaðar við 4%. Á íløgusíðuni verða avsettar 30 mió. kr. netto.

**<u>Býráðið 26. september 2024:</u>**
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskot frá Sonna á Horni, um í mun til tilmælið frá fíggjarnevndini annars, at lækka skattaprosentið við 0,5 % til 20,75%. Sonni á Horni, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri, Sheila S. Sóldal atkvøddi blankt og Eivind Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu ímóti. Sostatt fall uppskotið.

Síðani varð atkvøtt fyri tilmælinum frá fíggjarnevndini 23. september 2024. Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

**<u>Fíggjarnevndin 28. oktober 2024:</u>**
Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið til Fíggjarætlan, sum fyrliggur. Samlaði raksturin er 88,5 mió. kr. og løgurnar eru 36,2 mió. kr. Hetta er omanfyri samtykta karmin og mælir

fíggjarnevndin býráðnum til, at heita á nevndirnar um at fáa samlaða rakstrarkarmin undir 88 mió. kr. og samlaða íløgukarmin undir 30 mió. kr., áðrenn fíggjarætlanin kemur til 2. viðgerð.

**Býráðið 31. oktober 2024:**
Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskotið frá Ólavi Larsen. Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum.
Síðani atkvøddi býráðið um uppskotið frá fíggjarnevndini íroknað broytingaruppskotið frá Ólavi Larsen. Býráðið tók einmælt undir við hesum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 21.30

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sheila S. Sóldal

Sonni á Horni

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

17